ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Irak er ikki tann rætti vígvøllurin í bardaganum ímóti yvirgangi og hevur onga ntíð verið tað*

*Barrack Obama*

# Forseti skuldsettur fyri fólkamorð

**Sum tann fyrsti virkandi ríkisleiðarin er sudanski forsetin skuldsettur fyri fólkamorð**



*Sudanski forsetin Omar al-Bashir*
*Mynd: Polfoto*

Forsetin í Sudan, Omar Hassan al-Bashir, er sum tann fyrsti virkandi ríkisleiðarin nakrantíð skuldsettur fyri fólkamorð. Sjálvur heldur hann, at skuldsetingin fer bara at gera støðuna uppaftur verri.

Altjóða samfelagið hevur ferð eftir ferð fordømt ta harðrendu framferðina hjá sudansku stjórnini ímóti uppreistrarmonnum í landspartinum Darfur. Arabiskir hernaðarbólkar, sum sambært altjóða samfelagnum fáa stuðul frá sudansku stjórnini, ferðast millum bygdirnar, har teir ræna, neyðtaka og myrða fólk frá hond. Sudanska stjórnin avsannar, at hon hevur nakað við tey arabisku harkaliðini at gera.

USA hevur fleiri ferðir kravt, at sudanska stýrið skal steðga áganginum ímóti sivilfólkinum í Darfur, og amerikanska stjórnin hevur mælt altjóða samfelagnum til at fáa eitt valdsskifti í Sudan. Tað er ikki hent, men í sunnudagin valdi ovasti ákærin hjá altjóða krígsbrotsmannadómstólinum ICC, Luis Moreno-Ocampo, at skuldseta sudanska forsetan, Omar al-Bashir, fyri fólkamorð. Samstundis bað hann eina nevnd hjá ICC taka støðu til eina áheitan um at krevja forsetan handtiknan.

Hetta er fyrstu ferð, at ein virkandi ríkisleiðari er skuldsettur fyri fólkamorð, og um nakrar vikur fæst at vita, um ICC fer at biðja um at fáa hann handtiknan.

Omar al-Bashir heldur lítið um skuldsetingina. Tað gera nógvir sudanar eisini, tí tá forsetin vísti seg alment í gjár, vóru nógv fólk komin saman at fagna honum og at rópa rakstrarróp eftir USA. Sambært sudanska ST-sendiharranum skal Omar al-Bashir hava sagt, at skuldsetingin ímóti sær fer ikki at bøta um viðurskiftini í Darfur, heldur tvørturímóti.

# Ísland fær ikki evruna uttan ES-limaskap

**Íslendingar kunnu ikki brúka evruna sum gjaldoyra, uttan at landið fer upp í Evropasamveldið, sigur ES-samráðingarleiðarin Percy Westerlund**

Tey ótryggu búskaparviðurskiftini í Íslandi teir seinastu mánaðirnar hava elvt til orðaskifti um íslendka tilknýtið til ES og tað evropeiska gjaldoyrað, evruna. Millum annað hevur verið nevnt, at Ísland hevði fingið stóran ágóða av at fáa sær evruna til gjaldoyrað, sjalvt um landið framhaldandi verður uttan fyri ES. Men tað gongur ikki.

- Tað ber ikki til at seta evruna í gildi sum gjaldoyra uttan limaskap í ES, sigur ES-samráðingarleiðarin Percy Westerlund við Morgunblaðið.

Summir íslendskir politikarar hava sagt, at Ísland eigur at kunna fara upp í evrusamstarvið á sama hátt, sum landið er uppi í schengen-samstarvinum. Men hesi viðurskifti kunnu ikki samanberast, sigur Percy Westerlund.

- Handan leiðin kemur als ikki upp á tal,sigur hann við Morgunblaðið.



*Percy Westerlund*

## STUTT SAGT

### Eirindaleysir byrsumenn

Átta fólk lógu eftir á, tá byrsumenn fóru at skjóta úr einum bíli mitt í meksikanska býnum Guamuchil, sum er í Sinaloalandspartinum.Løgreglan sigur, at byrsumenninir skutu eftir fólki, sum stóðu og bíðaðu við ein gonguteig, og at ein 12 ára gomul genta var millum teirra, sum lótu lív. Nakrir fáar tímar frammanundan høvdu byrsumenn skotið ein løgreglumann og tikið fleiri fólk gíslar á einari matstovu í býnum Mazaltan. Meksikonsku myndugleikarnir siga, at harðskapurin kring landið hevur vundið nógv upp á seg í ár, og at í flestu førum hevur harðskapurin samband við rúsevnahandil.



*Byrsumenn skjóta frá hond í Meksiko*
*Mynd: AP*

### Obama til Palestina

Demokratiska forsetavalevnið í USA, Barrack Obama, fer í næstu viku til Miðeysturs. Hann hevur boðað frá, at hann ætlar sær til Ísraels og til Ramallah á Vestara Áarbakka. Palestinsku myndugleikarnir siga, at Obama skal hitta Mahmoud Abbas, forseta tann 23. juli, og at teir báðir fara at umrøða møguleikarnar fyri varandi friði millum palestinar og ísraelsmenn.. Palestinski samráðingarleiðarsin Saeb Erekat sigur við AP, at palestinar eru sera fegnir um, at Obama kemur til Vestara Áarbakka at vitja, tí tá John McCain herfyri var í Miðeystri, fór hann ikki til Vestara Áarbakka. Obama fer eisini til Ísraels.



*Obama skal vitja palestinar og ísraelsmenn*
*Mynd: AP*